# ítróttur

Nr. 28 • leygardagur • 9. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nógv stendur á SÍ



*Fram hevur helst mist FM-møguleikan, men teir kunnu væl fáa ávirkan á, hvar gullið skal enda. Eitt nú við at órógva SÍ um vikuskiftið*

**Fleyr og SÍ eru nú helst einastu liðini, sum kunnu vinna føroyameistaraheitið hjá monnum, og bæði fara á vøllin í morgin.**

**SÍ er aftanfyri í stigum, og tí er serligt trýst á teimum, men uppgávan er ikki løtt: Fram á útivølli**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Flogbóltskappingin hjá monnunum kann broytast nógv hetta vikuskiftið, men spurningurin er bara hvønn veg broytingin fer.

Tveir dystir eru í meistaradeildini, og tað kann bæði enda við tí, at tað verður javnari aftur, og at munurin millum oddaliðini økist.

Mest áhugaverdi dysturin hesaferð er í Eysturskúlanum í dag millum Fram og SÍ. Vit taka neyvan munnin ov fullan, tá vit siga, at Fram misti sín FM-møguleika við tapinum móti Fleyr síðsta sunnudag, men teir kunnu enn fáa ávirkan á, hvussu alt fer at spæla av. Og silvurmerkini eru enn at stríðast um. Hjá SÍ stendur eitt sindur meira upp á spæl, tí nú er kappingin so langt útliðin, at hvørt tap kann fáa avgerandi týdning. Kiksar tú einaferð, er næstan eingin tíð eftir til at rætta upp uppá støðuna. Tað vita sørvingar, og tí fara teir at gera alt fyri at vinna í dag, so Fleyr ikki sleppur alt ov langt framum.

Fleyr spælir á Kambsdali í dag móti ÍF, og á pappírinum er tað ein dystur teir eiga at vinna. Men hetta vælsignaða pappírið er ikki altíð so álítandi, og ÍF hevur fleiri ferðir fyrr í ár verið boysið hjá havnarmonnunum.

**Botndystur á Kambsdali**

Hjá kvinnunum eru eisini tveir dystir hesaferð. Tann fyrri verður í dag millum ÍF og Fleyr, og hesi bæði liðini eru tey niðastu í deildini. Vinnur ÍF, kunnu tær koma upp um Drátt, og so er tað eisini mestsum avgjørt, at Fleyr endar aftast. Vinnur Fleyr hinvegin, blanda tær seg upp í kappingina um bronsumerkini.

Hin dysturin verður í morgin, tá TB tekur ímóti Drátti. TB stevnir fram móti føroyameistaraheitinum, og tær hava ráð til at tapa ein dyst og framvegis kunna avgera alt sjálvar. Harvið er ikki sagt, at tær gera tað í morgin, og tað verður eisini óvæntað, um so verður. Størsti kappingarneytin hjá TB-kvinnunum í morgin verða tær sjálvar, tí tað er væl hugsandi, at tær eisini hava tankarnir eina viku longri frammi, nevniliga í steypafinaluni. Tað kann Dráttur kanska gera sær dælt av, men tað krevst ein 100% innsatsur frá øllum teirra leikarum, um tær skulu gera nakað við sterka TB-liðið í morgin.

## Tunnusláing á sjónum

FASTALÁVINT
*Stefan í Skorini*

Í dag, leygardagin, skipar Froskmannafelagið fyri tunnusláing á sjónum við Bursatanga í Havn. Tiltakið byrjar klokkan 14, og felagið bjóðar øllum oman at hyggja. Tiltakið er ókeypis.

Eisini er ætlanin at spenna eina línu tvørtur um, og síðani skulu froskmenninir royna at ganga á línuni uttan at detta útí sjálvandi.

Vanliga er uppmøtingin góð, og í fjør vóru eini 25 froskmenn við. Øll kunnu vera við, bara tey eiga eina drakt at fara í.

Sjálv tunnusláingin plagar at taka ein tíma ella so. Luttakararnir fara eftir ætlan at ganga á línu, meðan sláingin fer fram.

Til at halda tunnuni hava froskmenninir lænt ein kranabil, ið fer at halda henni yvir sjónum.

# Neistin kann fáa hevnd

**Bara tríggir hondbóltsdystir vera í bestu deildunum hjá kvinnum og monnum um vikuskiftið. Í Havn fær Neistin møguleikan at hevna tapið frá steypafinaluni, tá StÍF kemur á vitjan, og kvinnuliðini hjá somu feløgum møtast eisini. Í Klaksvík verður dystur millum VB og Stjørnuna hjá kvinnum**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Áhugaverdasti dysturin hetta vikuskiftið verður óivað í Havn millum StÍF og Neistan. Hesi liðini møttust í steypafinaluni seinasta vikuskiftið, og tá var StÍF sum kunnugt við yvirlutan. Nú hevur Neistin so møguleikan at hevna hetta tapið.

Tað er eisini neyðugt hjá Neistanum at fáa tvey stig, um havnarliðið skal megna at halda fast um trýstið á VÍF, ið liggur fremst. Neistin skal í roynd og veru vinna allar sínar dystir og fáa hjálp frá øðrum liðum, um tað skal eydnast at vinna FM-heitið.

StÍF hevur silvurmerkini at spæla fyri. Um tað eydnast at vinna enn einaferð á Neistanum er dysturin um silvurið púra opin. Lítil ivi man vera um, at Neistin fegin vil prógva, at teir kunnu vinna á strandingum.

Neistin er hesuferð uttan John Petersen, ið er á venjingarlegu við fótbóltslandsliðnum, og tað er ein stórur missur.

Kvinnuliðið hjá Neistanum skal eisini taka ímóti StÍF. Neistin dyrgir eftir bronsumerkjunum, meðan StÍF roynir at bjarga sær undan niðurflyting.

StÍF vann í vikuni móti Kyndli í Havn, so tær hava prógvað, at tær kunnu bíta frá sær, men Neistin er størfavorittur undan dystinum.

Í Klaksvík møtast Stjørnan og VB. Bara tvey stig eru ímillum liðini, so hetta er ein gyltur møguleiki hjá VB at taka seg inn á Stjørnuna. Tað verður óivað annað av hesum liðunum, ið fer avstað við silvurmerkjunum.

Stjørnan skal vinna fyri at hava møguleikan at hótta VÍF, men um tær ikki vinna henda dystin, er meistaraheitið avgjørt.

**Støðan 1. deild menn**

| Lið | Dystir | V.m. | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 4 | 470 | 386 | 84 | 19 |
| 2 Neistin | 5 | 523 | 439 | 84 | 18 |
| 3 StÍF | 4 | 439 | 425 | 14 | 12 |
| 4 H71 | 5 | 470 | 498 | -28 | 8 |
| 5 Tjaldur | 6 | 447 | 507 | -60 | 8 |
| 6 Kyndil | 5 | 395 | 441 | -46 | 7 |
| 7 KÍF | 5 | 447 | 495 | -48 | 5 |

**Støðan 1. deild kvinnur**

| Lið | Dystir | V.m. | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 3 | 443 | 263 | 180 | 18 |
| 2 Stjørnan | 3 | 401 | 313 | 88 | 15 |
| 3 Neistin | 5 | 375 | 327 | 48 | 13 |
| 4 VB | 4 | 377 | 380 | -3 | 13 |
| 5 StÍF | 4 | 298 | 377 | -79 | 5 |
| 6 Søljan | 6 | 327 | 499 | -172 | 4 |
| 7 Kyndil | 5 | 392 | 454 | -62 | |





KÍF – H71 32-32 (17-14)

# KÍF fekk týdningarmikið stig

**KÍF vann sær eitt týdningarmikið stig í stríðnum móti niðurflyting, tá dysturin móti H71 í Vestmanna endaði við javnleiki. Kollfirðingar munnu tó iðra seg eitt sindur, tí teir vóru frammanfyri størsta partin av dystinum. Tó kundi H71 eisini avgjørt til egnan fyrimun móti endanum**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*KÍF og H71 spældu hóskvøldið javnt í høllini í Vestmanna. Her roynir Halgir Dahl-Olesen seg*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hóskvøldið møttust KÍF og H71 í høllini í Vestmanna. H71 mundi vera favorittur frammanundan dystinum, men teir fingu harða mótstøðu frá kollfirðingum.

Fyrra helming av fyrra hálvleiki hevði KÍF greiða yvirvág. Heimaliðið førdi við fimm málum, og tá H71 tók eitt leikbrá (time out). Hetta hjálpti nakað uppá støðuna, og H71 megnaði at minka um munin. Tá farið varð til hálvleik, vóru trý mál á muni.

Í seinna hálvleiki fylgdust liðini ómetaliga væl, og spenningurin var allatíðina í hæddini. Tað var tó KÍF, sum fyri tað mesta var frammanfyri, og teir megnaði at halda munin heilt til endan.

Seinastu minuttirnar tók H71 sær um reiggj og fór nú framum heimaliðið. KÍF svaraði tó aftur, og Petur Martin Poulsen fekk útjavnandi málið.

**Dysturin í tølum**
KÍF – H71 32-32 (17-14)
**KÍF:** Eddie Joensen 9, Jákup Dam 6(5), Durica Tomic 5(1), Iljan Topic 5, Petur Martin Poulsen 4, Kristian Madsen 1, Regin Petersen 1, Finn Heri Johannesen
**H71:** Finnur Hansson 8(1), Bjarni Wardum 7, Halgir Dahl-Olesen 7, Kristian Petursson 5, Olaf Vestergaard 4, Hans J. Jacobsen 1
**Brotskøst:** KÍF 7, H71 1
**Útvísingar:** KÍF 4, H71 5
**Dómarar:** Hannis Wardum og Uni Wardum.

Tjaldur-Neistin 24-29 (11-16)

# Neistin greiddi sína skyldu

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Neistin vann mikukvøldið á Tjaldri í høllini í Runavík. Talan var ikki um nakran sannførandi sigur, men havnarliðið gjørdi sína skyldu.

Neistin skuldi reisa seg eftir tapið í steypafinaluni leygardagin, og tað megnaðu neistamenn.

Havnarliðið var greiður favorittur undan dystinum, og hóast sigurin bara var fimm mál, so vóru stigini ongantíð veruliga í vanda.

Áki Mørk og Kári Mortensen, ið ikki fingu glið á spælið móti StÍF, vóru toppskjúttar hjá Neistanum

**Dysturin í tølum**
**Tjaldur:** Zoran Sarpevic 5(1), Arnfinn Langgaard 4, Dragisa Stojovic 4, Sverri Justinussen 3, Svein í Heiðinum 3, Tummas Magnussen 2, Dan Thorleifsson 2, Hartvig Joensen 1.
**Neistin:** Áki Mørk 8, Kári Mortensen 7, Heini Joensen 6, Hans Áki Dal-Christiansen 5(3), Ári Rouch 2, Jacob Jónsson 1.
**Útvísingar:** Tjaldur 3, Neistin 3
**Brotskøst:** Tjaldur 2, Neistin 3
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen og Hannis Wardum.

# Dómari úr Liktinstein til steypafinalurnar

**Flogbóltssambandið hevur sent boð eftir einum dómara úr Liktinstein at døma steypafinalurnar, sum vera næsta vikuskiftið. Hann hevur hollar altjóða royndir**

FLOGBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*Flógbóltssambandið hevur fingið ein altjóða dómara at taka sær av steypafinalunum. Hann eitur Philippe Schürmann, og hann dømir einar 60 dystir um árið*

Talan er um Philippe Shürmann, sum fer at døma steypafinalurnar hjá monnum og kvinnum, ið verða leiktar í høllini á Hálsi leygardagin 16. februar. Philippe skal døma báðar finalurnar saman við Rúna Weihe, ið verður 2. dómari.

Schürmann hevur virkað sum dómari síðan 1985, og hann varð altjóða viðurkendur í 1996. Av tí at Liktinstein liggur miðskeiðis í Evropa, fær hann nógvar uppgávur, og hann dømir einar 60 dystir um árið.

Tá Føroyar hava verið við í kappingum fyri smátjóðir, hevur Philippe Schürmann ofta verið við sum dómari.

Hann hevur eisini verið formaður í Flogbóltssambandinum hjá Liktinstein, og hann hevur eisini verið formaður í felagsskapinum fyri smátjóðir í Evropa.

Í finaluni hjá kvinnum møtast TB og Mjølnir, og hesin dysturin byrjar klokkan 14.30. Hjá monnum møtast SÍ og ÍF, og hesin dysturin byrjar beint aftaná ella umleið klokkan 16.

# Hondbóltslandsliðið úttikið

**Manslandsliðið hevur síðan oktober í fjør havt regluligar venjingar, og venjarin Lars Nedergaard hevur boðað til venjingar um vikuskiftið. Hópurin er nakað broyttur síðan seinastu venjing**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Hondbóltslandsliðið skal um eitt ár luttaka í undankappingini til EM. Fyrireikingarnar eru fyri longari tíð síðani farnar í gongd, og um vikuskiftið er hópurin aftur innkallaður til venjingar.

Landsliðsvenjarin Lars Nedergaard, ið er dani, hevur sent boð eftir 16 leikarum til venjingina. Umframt at venja saman um vikuskiftið í Vestmanna verður eisini skipað fyri einum venjingardysti mánakvøldið.

Tá fer landsliðið at spæla ímóti einum úrvalsliði av útlendingum, sum dagliga spæla í føroysku deildini. Tað er Costin Dumitrescu, venjari hjá StÍF, ið stendur á odda fyri tí liðnum.

Nakrir útisetar eru komnir heim til hesa venjingina. Málverjin Jens Skipagøta og Martin Hummeland, ið báðir búgva niðri í Danmark, vera við.

Landsliðshópurin er broyttur nakað síðan seinastu venjing. Nakrir leikarar eru komnir afturat, meðan aðrir eru farnir. Mortan Hansen úr Tjaldri, Bent Djurhuus og Sveinur Justinussen úr StÍF og Áki Mørk úr Neistanum hava boðað frá, at teir ikki hava stundir at vera við í hópinum. Eli Müller úr VÍF, Tróndur Joensen úr Amager/CIK, Bárður Brimvík og Levi Nybo úr H71 dragast við skaðar og kunnu tískil ikki vera við fyribils.

Umframt at taka sær av landsliðnum fer Lars Nedergaard at greiða frá á fundi í ÍSF-húsinum, hvussu venjarar kunnu fáa tað besta burturúr venjingini.

**Hópurin:**
**Málmenn:** Jens Skipagøta (Amager/CIK), Lars L. Black (Kyndil), Johan Danielsen (Kyndil)
**Strikuspælarar:** Janus Einar Sørensen (Kyndil), Kristian Madsen (KÍF)
**Vengur:** Hans Áki Dal-Christiansen (Neistin), Haraldur Bjørgvin (VÍF), Martin Hummeland (Næstved/Herlufsholm)
**Bakspælarar:** Sámal Joensen (VÍF), Heini Joensen (Neistin), Ingi Olsen (VÍF), Bjarni Wardum (H71), Áki Olsen (VÍF), Halgir Dahl-Olesen (H71), Høgni Klein (Kyndil), Regin Petersen (KÍF)

Venjari er Lars Nedergaard, og hjálparvenjari er Hjalmar Klein Olsen. Frank Petersen er styrkivenjari, og Jákup Durhuus er liðleiðari.

# Østergaard ætlar at keypa enskt felag



*Flemming Østergaard hevur ætlanir um at keypa eitt enskt 1. deildarfelag*

**Stjórin í FC København, Flemming Østergaard, hevur ætlanir um at keypa eitt enskt felag í 1. deild. Hetta skriva donsk bløð í dag**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

FC København hevur áhuga í at keypa meirilutan av partabrøvunum í einum enskum 1. deildar felag.

– Vit leita framvegis eftir einum felagi, sum spælir í ensku 1. deild, og vit eru tilreiðar at keypa, um fíggjarætlanir og fyrireikingarnar halda, sigur Flemming Østergaard.

Tó er einki ítøkiligt tilboð á borðinum beint nú. Flemming hevur fyrr fingið tilboð um at keypa enska 2.deildar felagið Huddersfield og okkurt franskt felag, men tá hevur hann ikki keypt.

Talan er um at keypa meirilutan av partabrøvunum, so at FC København hevur ræðið á einum felag. Hetta er fyrstu ferð, at eitt danskt felag hevur ætlanir um at keypa eitt útlendskt felag.